# Rækjurok og ongin prísur

RÆKJUFISKISKAPUR

*Orð og myndir: Jústinus Leivsson Eidesgaard*



*Akamalik liggur knallreyður veldugur og landar í Nuuk*

**Nuuk, Sosialurin:**
- Tað er ikki tí einki er at fáa. Næstseinasta dagin hendan túrin fingu við 63 tons av pakkaðum rækjum, klárar til forbrúkaran, men tað nyttar lítið, tá prísurin er í botni, sigur Jógvan Tróndarson, skiparin á Akamalik, ein av nýggjastu og størstu rækjutrolaranum hjá Royal Greenland og flaggskipið hjá hesum felag.

Vit eru í fyrstu døgunum í juni og Akamalik liggur stórur og prúður við Atlantskajuna í Nuuk. So skjótt sum teir hava lagt at, so verður farið undir at landa og veiðan hjá Akamalik gevur einki arbeiði á landið, annað enn at hon verður á plattum førd í bingjur og síðan flutt av landinum sum liðugt vøra. Men dagin, tá skipið kemur inn er nógv at gera og tað er stutt millum plattarnar úr lastini og upp á bryggjukant. Grønlendingar eru tiltiknir kvikir menn og tað sæst eisini nú teir landa.

Jógvan sær troyttur út, bleikur og gráður í andliti. Tað er ikki bara sum at siga tað at hava ábyrgdina av so dýrum skipi, nú hýsan er vorðin dýrari fiskur enn rækjan. Vit sita og práta eina lítla løtu, nú ein skái er, og ongin rópar eftir honum. Tað er nógv at gera hjá einum skipara, tá skipið júst er komið í havn. Teir eru eisini túraðir, tí nógv hevur verið at gera seinastu dagarnar til havs, og fiskiskapurin hevur verið góður.

## Í harraverilsinum

Salongin hjá Jógvani eru sum ein stór íbúð, og hann hvørvur næstan í øllum hesum fína. Har er stór stova og fundarrrúm, skrivstova, kamar og vesi við bað. Fyrst eg kom umborð sat eg eina løtu inni á skiparakamarinum og eygleiddi, meðan Jógvan var til arbeiðis og tað var ikki hissini at taka støðu til. So var tað reiðsskapur, so var tað pengar til grønlendsku manningina, sum skuldi ein túr í land. Teir hava ikki somu skipan sum yvirmenninir og eru ofta við fleiri mánaðar í senn. Og so var tað reiðarin, sum eisini skuldi hava sítt at vita. Skiparin var ikki í frið eitt sekund, og tað var hann heldur ikki á hinum bátunum, eg vitjaði í Nuuk. Tað hendir nakað, tá eitt skip er komið í havn. Tó, teir sum skulu heim eru nú eitt sindur lættari hýrdir, enn teir sum skulu undir nýggjan túr. Tað vil so vera. Men hetta sært tú ikki umborð á Akamalik, tí teir hava fiskað so skjótt hendan túrin, at teir eru inni eitt heilt samdøgur áðrenn uppruna ætlað. Hin skiparin, Linjohn úr Skálavík er slett ikki komin til Grønlands enn, hann er á veg. Linjohn verður slett ikki kallaður skipari umborð, hann fær ikki annað navn enn borgmeistarin, eisini av grønlendingunum, tá hann ikki hoyrir, og hetta stavar frá hansara karrieru í kommunalpolitikki, halde eg.



*Jógvan Tróndarson er eisini bankastjóri umborð. Her gevir hann einum av manningini pengar til at fara í land fyri*

## SARS sjúkan

Men nú er also ein skái, og vit sita og práta á skiparaíbúðini einsamallir. Tað er heldur ikki hissini sum plágar føroyska fiskimannin, eitt nú sjúkan Sars, sum vit annars hoyra mest til í Hong Kong, Kina og Kanada og tað er júst her hundurin liggur begrivin.

- Rækjuvinnan hevur brúkt nógva tíð og nógvar pengar upp á at uppbyggja ein rækjumarknað í Kina og eitt nú vit liggja inni við nógvum, rækjum sum eru tilgjørdar spesielt til kinesiska marknaðin. Men SARS sjúkan hevur ført við sær, at hesin marknaður er burtur og nú koma allar rækjurnar, sum annars skuldu verið seldar í Kina út á hin marknaðin, sum kneykrar undir at alt ov nógvar rækjur eru á marknaðinum. Og úrslitið er, at prísurin bara fellir enn meira, sigur Jógvan Tróndarson og klórar sær um sín kumlaða nakka. Hetta er ikki lætt at hava við at gera.

- Prísurin hevur ikki verið so lágur í søguni hjá rækjunum sum handilsvøra. Ein triðingur av rækjunum sum vit hava inni skuldu til Kina, nú er hesin marknaður burtur og tað er steinur omaná byrðu, at Kinarækjurnar nú enda úti á einum frammanundan knúsaðum marknaði, sigur Jógvan Tróndarson.

- Prísurin er eisini vánaligur á sekkjarækjunum, tað eru einfalt ikki keyparar til allar rækjurnar. Hetta hevur stórar avleiðingar fyri grønlendska samfelagið, sum hevur so fá bein at standa á. Her eru jú bara rækjur, svartkalvi og krabbi, sigur Jógvan Tróndarson.

## Bátar liggja

Er tað ikki vandamikið bara at fiska seg burtur úr vánaliga prísinum. Verður einki gjørt í Grønlandi fyri at steðga skeivu gongdini?

- Jú, nakað verður gjørt. Av teimum 15 stóru rækjutrolarunum eru bara fimm úti í løtuni. Hinir eru á verft ella liggja stillir. Vit skulu tó ikki klaga, tí vit klára okkum við lágum prísi av tí at skipið hevur so stóra kvotu í Vesturgrønlandi. Hevur ein bátur av hesi støddini ikki millum 6-8000 tons í kvotu, so stendur hann seg ikki.Vit veiddu 7500 tons í fjør, sigur Jógvan Tróndarson

Fyrst í juni mána var næstan ikki dagur, at ikki onkur grønlendskur rækjutrolari lá inni í Nuuk. Sosialurin vitjaði tríggjar av hesum bátum, allir við føroyskum yvirmonnum og allir vóru eins ørkymlaðir av vánaliga rækjumarknaðinum og útlitunum.

Hesin túrurin hjá Akamalik hevur verið ein av teimum longru, tí hann byrjar heilt í Spania, har skipið varð bygt. Skipið hevur verið til eftirlit. 17. mai vóru teir inni í Íslandi. Teir byrjaðu túr í Eysturgrønlandi 22 juni. Har var einki at fáa og teir sigldu síðan suður móti Kappanum og norður um norður á Stóra Hellefiskabankan næstan í einum og endaðu vestur móti kanadiska markinum. Har bar rættuliga til.

- 63 tons tann seinasta dagin av lidnari vøru, pakkaðum rækjum, frystar á plattum, klárar at koyra í bingjuna. Men vit jakta rekordina, sum trolarin Sisimiut hevur. Hann fekk einaferð 68 tons av ísaðum rækjum, sigur Jógvan Tróndarson.

Jógvan hevur siglt 17 ár í Grønlandi.

# Forvitnislig mynd hvarv av kortinum

RÆKJUR

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

**Sosialurin, Nuuk:** Nýggj tøkni er góð, men viðhvørt er hon ov góð. Tað mátti undirritaði sanna, tá Sosialurin vitjaðu umborð á trolaranum Kiliutaq í Nuuk fyrst í mánaðinum. Undirritaði skuldi royna nýggja kameraði, hetta var fyrsta uppgávan og væl riggaði. Men av eini ella aðrari orsøk, so hvurvu myndirnar, tá tær vóru komnar inn í telduna. Og tá kortið í fotatólinum var tómt frammanundan, so var einki at gera.

Tað var ein forvitnislig mynd sum hvarv. Hon var av báðum føroysku/donsku manningunum á Kiliutaq, tí sum er umborð nú og tí sum heldur frí. Vit biðja tykkum sum vóru so hjálpsamir at stilla upp til myndina um at halda okkum til góðar. Allar sum ein.

Hvat er ein myndatekstur uttan mynd, tit fáa hann alíkavæl. Soleiðis skuldi myndateksturin síggja út. Frá vinstru framman *Høgni Stakksund, fabrikksjefur, Havn. Ivan Olsen, skipari, Havn, Per Bech, yvirstýrimaður, Tvøroyri, Petur Kjærbæk, skipari, Vági og Knud Jensen, kokkur Danmark. Tummas J. Lervig, mastinstjóri, Klaksvík, Frank Hansen, 1. meistari, Danmark, Meinhard Johannesen, yvirstýrimaður, Miðvági, Regin Áki Hansen, 1. meistari, Argir og Andre Joensen, 1. stýrimaður, Vági*





*Anders Fogh Rasmussen og Anfinn Kallsberg undirskriva avtaluna, sum fremur eina røð av yvirtøkum í einum á ólavsøku í 2004*

*Mynd: Áki Bertholdsen*

# Lýstu fyri yvirtøkum

**Løgmaður og forsætisráðharrin hava undirskrivað eina yvirlýsing, sum sigur, at ein yvirtøkulóg verður samtykt í komandi tingsetu. Lógin heimilar yvirtøku av øllum málsøkjum, sum ikki eru fevnd av grundlógini. Anfinn Kallsberg og Anders Fogh Rasmussen fegnaðust báðir um avtaluna**

YVIRTØKUR

*Ingi Rasmussen*

»Et meget positivt møde,« segði Annfinn Kallsberg, løgmaður. »Et særdeles posivt møde,« segði Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharri.

Stutti fundurin millum leiðararnar fyri ávikavist Føroya landsstýri og donsku stjórnina á býráðsskrivstovuni á Tvøroyri fyrrapartin hósdagin var væleydnaður. Hóast teir bert høvdu tosað saman í minni ein tíma, var úrslitið, at ein nýggj yvirtøkulóg, sum arbeitt hevur verið við í longri tíð, varð undirskrivað í góðum felagsanda.

– Frá byrjanini av mínari tíð sum forsætisráðharri hevur tað verið greiða linjan hjá stjórnini, at vit ynskja eina víðkan og víðari menning av ríkisfelagsskapinum. Tað merkir, at Føroyar og Grønland skulu yvirtaka ábyrgdina av einari røð av málsøkjum. Í dag eru vit so vorðin samd um, at Føroyar skulu yvirtaka fleiri týðandi málsøki, sum bæði liggja innan og uttan fyri karmarnar av Heimastýrislógini, segði Anders Fogh Rasmussen.

Tað krevur eitt nýtt lógargrundarlag, og tað var tilsøgnina um hetta, sum partarnir undirskrivaðu í einari felags yvirlýsing á Tvøroyri.

## Felags yvirlýsing

Føroya løgmaður og danski forsætisráðharrin eru í yvirlýsingini samdir um, at lógargrundarlagið skal fáast til vega í komandi løgtings- og fólkatingsári. Tað skal slóða fyri yvirtøku av fleiri málsøkjum út frá ávísum grundreglum.

Føroysku myndugleikarnir yvirtaka ábyrgdina fyri øll mál og málsøki innan fyri karmarnar av felagsyvirlýsingini frá 14. januar 2002 millum løgmann og forsætisráðharran.

Yvirtøkurnar henda í einum, tá yvirtøkulógin kemur í gildi. Tað er kortini ikki galdandi fyri nøkur málsøki, har yvirtøkan setir serlig krøv til fyrireikingina, sigur yvirlýsingin uttan at útgreina nærri, hvørji tey eru. Men helst er talan um m.a. løgregluna.

Um Løgtingið og Fólkating-ið samtykkja yvirtøkulógina, verður miðað ímóti, at lógin kemur í gildi á ólavsøku, 29. juli 2004, stendur at enda í yvirlýsingini, sum er undirskrivað av Anfinni Kallsberg, løgmanni, og Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharra.

– Yvirtøkulógin merkir, at føroyingar kunnu yvirtaka alt uttan tað, sum er innan fyri karmarnar av ríkisfelagsskapinum og grundlógini. Nú er tað upp til føroyska fólkið, løgtingið og landsstýrið at gera av, hvat innihaldið skal vera í viðurskiftunum millum Føroyar og Danmark, segði Anders Fogh Rasmussen eftir, at teir høvdu skrivað undir.

## Nógvar í tali

Yvirtøkurnar, sum samgongan hevur sett íkortið hetta samgonguskeiðið, eru nógvar í tali.

Løgmálaráðið arbeiðir við at yvirtaka sivilrættarmál (t.e. persóns-, hjúna- og arvarættarmál), løgregluna, rættarskipan og dómstólar, útlendingamál og fjølmiðlaábyrgd.

Fiskimálaráðið stendur fyri at taka yvir málsøkini tilbúgving, vitaverk sjóuppmerking og veðurtænastu.

Fíggjarmálaráðið arbeiðir við at taka yvir penga- og fíggjarmál, undir hesum banka- og sparikassalógirnar.

Vinnumálaráðið arbeiðir við at taka yvir vinnufelagsrættin og onnur vinnumál, uppi í hesum eru eisini flogvøllurin í Vágum.

Mentamálaráðið arbeiðir við at taka yvir fólkakirkjuna og átrúnaðarmál. Oljumálaráðið stóð fyri at taka yvir havumhvørvisverndina. Hetta var gjørt 1. mai í 2003.




*Tað gekk striltið at lenda í Vágum, men tað forðaði ikki Anfinni Kallsberg og Andres Fogh Rasmussen at vera vinsælir, tá flogfarið hjá Atlantsflog umsíðir setti seg*

*Mynd: Edvard Joensen*